tíðindablaðið sosialurin

FRÆLSI – JAVNAÐUR – BRØÐRALAG

Ábyrgdarbleðstjóri: Jan Müller
Fyritøkusstjóri: Kristian Dahl
Ljósmyndari: Kalmar Lindenskov

Bløðfólk: Randi Jacobsen - Bagny Joensen - Torfinn Smith - Hilmar Jan Hansen - Justinus Eidesgaard

Útgevari: P/f Sosialurin
Uppseting: P/f Sosialurin
Prent: P/f Pressan 1981

Bústaður: Argjavegi 26, Argjum
Telefon: 11820

Postadr.: Postsmoga 76, 110 Tórshavn
Telefax: 14720

## Oljuvinna nærkast

EIN spurningur, sum varð nevndur undir samráðingunum í Keypmannahavn týsdagin og sum eisini er við í avtaluni er ein komandi føroysk oljuvinna. Her verður víst á avtaluna frá 22. desember í fjør, har tað m.a. stendur, at føroyingar - um vit fáa inntøkur frá eini komandi oljuvinnu - skulu brúka hesa til at rinda møguliga restskuld til danir umframt at spurningurin um blokkstuðulin skal endurskoðast. Eisini verður sagt, at føroyingar skulu leggja seg eftir at brúka danska ekspertisu á oljuøkinum, um hon er kappingarfør. Í avtaluni frá 12. oktober stendur so viðari "at landsstýret og regeringen vil snarest i fællesskab overveje udmøntningen heraf".

TAÐ man neyvan vera nakar føroyingur, sum ikki heldur tað vera heilt natúrligt og rætt, at vit samstarva við danir á oljuøkinum eins og vit hava gjørt tað á so mongum øðrum økjum eisini. Her finst longu eitt sera gott samarbeiði millum Jarðfrøðissavnið og Danmarks Geologisk Institut og bendir nógv á, at hetta samarbeiði verða útbygt í komandi tíðum. Júst á DGU eiga teir fólk og tøknifrøði, sum er millum tað fremsta í heiminum, tá talan er um eitt nú tulkingar av seismiskum kanningum.

DANIR hava latið okkum rættin til undirgrundina, og henda rætt fara teir ikki at taka frá okkum aftur. M.a. hetta úttalaði fyrrverandi danski orkumálaráðharrin seg um í eini samrøðu við Sosialin herfyri. Hann vísti tó á, at tað er neyðugt við einum ella øðrum samarbeiði men vildi so ikki siga meira um tað. Nú síggja vit so í protokolatinum frá fundinum tann 12. oktober, at landsstýrið og ríkismyndugleikarnir fara sum skjótast at seta út í kortið eitt slíkt samarbeiði. Hvat júst liggur í hesum kundi verið áhugavert at vita. Ráevnini í undirgrundini eru jú yvirtikin sum sermál og tvs. at vit sjálvi avgera, hvat skal henda við teimum. Onkur vildi tí spurt, um umrødda orðing í avtaluni hesum viðvíkjandi er at leggja seg út í eitt sermál ella tað bert er ein natúrlig uppfylging av tí avtalu, sum varð gjørd 22. desember í fjør.

LANDSSTÝRIÐ arbeiðir nú við at tilrættaleggja eina oljufyrisiting og at innheinta tilboð upp á forkanningar ol. Her stinga fleiri áhugaverdir spurningar seg upp, eitt nú hvussu farast skal fram og í hvønn mun vit eiga at læra av royndunum hjá øðrum. Í hvønn mun vit eiga at láta hetta virksemið vera á privatum hondum og/ella ríkið av almennum felögum.

TALAN er um stór samfelagslig virði og áhugamál og tí eiga vit at fara hóvliga fram og ikki taka við tí fyrsta og besta. Neyvan er tað rætt at seta á stovn eina stóra almenna oljufyriroku eins og talan er um í t.d. Noregi og Danmark. Her man tað vera rættari at biðja privata oljusektorin koma við tilboðum og síðani seta honum treytir, sum skulu tryggja, at føroysk samfelagslig áhugamál verða prioriterað. Harvið er ikki sagt, at vit føroyingar eiga at brúka alla tað serfrøði vit kunnu fáa frá eitt nú almennum donskum granskingarstovnum sum eitt nú DGU.

ALT hetta eru spurningar, sum komandi oljufyrisitingin fer at taka til viðgerðar. Nú ræður um at seta skjótil á, soleiðis at forkanningar kunnu koma í gongd. Júst forkanningarnar tvs. seismiskar kanningar oa. eru so týdningarmiklar, tí tað verða tær, sum koma at siga okkum nakað um møguleikarnar at finna olju og gass í undirgrundini. Alt bendir á, at olja og gass finst í føroyskum øki, men enn restar so í at fara undir miðvísar kanningar, ið skulu prógva hetta.

*Marita Petersen, løgmaður:*

# Ongar ætlanir um alment føroyskt oljufelag

Herfyri samtykti løgtingið løgaruppskot um forkanningar í sambandi við eina møguliga komandi oljuvinnu. Síðani hevur verið arbeitt í landsstýrinum við málinum.

Nú løgargrundarlagið er komið upp á pláss er farið undir at leggja til rættis eina umsiting. Løgmaður, sum umsitur undirgrundarmál, roknar við, at tað verður ikki so leingi til tær ymsu fyrireikingarnar eru liðnar og ein tá kann ein lata umheimin vita, at nú er klárt at byrja samráðingar um eitt nú forkanningar ol.

Í seinastuni hevur eisini verið ymiskt frammi frá donskum politikarum um júst oljuspurningin. Fyrrverandi danski uttanríkisráðharrin segði við Sosialin, at tað var einki annað enn rímuligt, at føroyingar og danir tóku upp eitt samarbeiði á oljuøkinum. Eisini fyrrverandi orkumálaráðharrin hevur borið hetta upp á mál.

### DONG

Tað hevur í hesum orðaskiftinum eisini verið nevnt, at feløg sum tað almenna danska DONG skulu taka upp samarbeiði við okkurt føroyskt felag. Vit hava spurt løgmann, um ætlanin er ella hon kundi hugsað sær, at vit fingu eitt alment føroyskt felag, sum skal fara upp í oljuvinnuna í møguligum samarbeiði við eitt dansk felag av sama slag?

-Vit eru í ikki gongd við at stovna eitt alment føroyskt oljufelag, og tað er ikki nakað, sum týðir upp á, at vit fara at gera tað beint nú í hvussu so er sigur hon.

Sosialurin hevur skilt, at oljuráðleggingarbólkurin er av somu áskoðan sum løgmaður.

### DGU

Marita Petersen heldur einki løgið vera í at taka upp samstarv við danir á oljuøkinum. Hon vísir tvørturimóti á, at vit sum er hava havt eitt gott samarbeiði millum eitt nú Jarðfrøðissavnið og DGU, og hon ynskir fegin at varðveita tað samarbeiðið upp á ein skilagóðan máta - uttan tó at forða fyri, at vit fáa flest møgulig oljufeløg, sum kundu hugsað sær at gjørt kanningar á føroyskum øki at vera við, tá tilboð skulu innheintast.

Undir viðgerðini á tingi av oljumálinum vóru tað tingmenn, sum settu fram ynski um at hildin verða skeið ella ráðstevnur um allan oljuspurningin, nú hann er so nýggjur og fremmandur fyri okkum.

Løgmaður hevur tikið hesi ynski til eftirtektar og í løtuni verður ein ráðstevna ella l. fyrireikað. Helst verður hon einaferð í november.

jan


## Gávan til konfirmantin

HEIMUR OKKARA er fyrsta alfrøðin (leksikon) á føroyskum.

Á tremur av upplýsingum um gamalt og nýtt, eisini tað nýggjasta nýggja. 500 greinir um søgu, vísindi, ítrótt, list, tónleik, samfelagsviðurskifti, landalæru, frítíð og mangt, mangt annað.

Á hvørjari síðu eru framúr góðar litmyndir, sum stuðla tekstinum, einar 3.500 íalt. Í 2. bindi er eisini stórt innihaldsyvirlit við meiri enn 6.000 leitorðum.

### Alfrøðin er rætta gávan til konfirmantin

Alfrøðin HEIMUR OKKARA
*bind 1 og 2 fæst í bókabúðunum.*
*Kr. 390.- fyri hvørt bindið.*
(Sláið tykkum saman at geva hesa stórfingnu gávu)

BÓKADEILD FØROYA LÆRARAFELAGS
FØROYA SKÚLABÓKAGRUNNUR

*Vitan er virði*